# Einki um tosið

**Tosið um at Jákup Mikkelsen hevur sett fram ynski um at koma til FCK tykist ikki at hava nakað hald í veruleikanum, men vísir hinvegin, hvussu skjótt mál verða blást upp í fjølmiðlunum**

SUPERLIGA
*Jákup Mørk*

Síðani Jákup Mikkelsen í seinastu viku setti seg sjálvan á sølulistan, hevur ljóðað, at føroyski landsliðsmálverjin hevur eitt ynski um at sleppa at spæla við høvuðsstaðarfelagnum, FCK.

## Einki hald

Sambært málverjanum sjálvum hevur alt hetta tosið tó ikki nakað hald í veruleikanum.

Tosið er íkomið, eftir at heimasíðan, fck-online.dk, hósdagin setti seg í samband við hann. Spurdur um hann hevði havt áhuga í at koma til FCK, svaraði Jákup, at tað hevði sjálvandi verið ótrúliga stuttligt.

Tá vit sunnudagin tosaðu við Jákup, hevði hann sjálvur bestan hug at smíla at øllum hesum tosi.

– Eg setti meg fyrst og fremst á sølulistan, tí eg var eitt sindur ótolin eftir, at Herfølge skuldi taka okkurt stig í samband við sáttmálan hjá mær, sum rennur út í summar. Nakað eftir hetta ringdu tey frá fck-online, og tá svaraði eg sjálvsagt, at tað hevði verið spennandi. Minni enn ein tíma eftir, at eg hevði tosað við tey, ringdu tey frá Radiosporten og spurdu, um eg veruliga var ávegis til FCK. Hatta vísir í øllum førum, at mann skal ansa eftir, hvat sagt verður við pressuna, leggur málverjin afturat.

Annars upplýsir Jákup, at stigið hjá honum við at seta seg á sølulistan tykist at hava loyst seg, tí longu dagin eftir setti leiðslan í Herfølge seg í samband við hann, fyri at fáa ein fund í lag. Ein fundur, sum varð hildin í gjár, og sum vit tí-skil ikki kenna úrslitið av.

## Herfølge kravdi meira

Annars skrivar danska heimasíðan eisini, at FCK fyri nakað síðani var í samráðingum við Herfølge um eitt møguligt keyp av føroyska málverjanum, og hesum játtar Jákup eisini.

– Tað var fyri einum tveimum árum síðani. Eg varð spurdur, um hetta hevði havt mín áhuga, og eftir at eg hevði svarað játtandi, fóru feløgini at samráðast. Minnist meg rætt, vildi FCK lata á leið 2,7 mió kr. fyri meg, men tá Herfølge samstundis hevði fyrispurning frá einum skotskum felagi, royndu teir at trýsta prísin upp. Endin varð, at handilin varð av ongum, og ístaðin keypti FCK Michael Stensgaard, sigur Jákup um hetta.

## Vil víðari

Tað tykist tó greitt, at Jákup í løtuni ikki hevur tann stóra áhugan at verða verandi í Herfølge.

Fyri nøkrum vikum síðani førdi Norðlýsi fram, at Jákup ikki vildi vísa aftur, at hann fer at spæla við KÍ seinni í ár, og hóast eingin avgerð er tikin, so vil Jákup framvegis ikki afturvísa hesum.

– Nú havi eg verið í Herfølge í sjey ár, og sjálvur haldi eg, at tað nú er tíð til at royna okkurt annað. Í hesum sambandi hava konan og eg eisini tosað um møguleikan at flyta heim aftur. Sonurin verður seksár í apríl, og so er skjótt aldur til skúlagongd, so tað er klárt, at Føroyar eisini eru í myndini.

– Enn er tó einki sum helst avgjørt í øllum hesum. Einki felag hevur enn sett seg í samband við meg, men í løtuni eri eg í øllum førum opin fyri øllum møguleikum, sigur Jákup Mikkelsen at enda.




*Hóast fjølmiðlarnir hava gjørt nakað burturúr, so sigur Jákup, at í løtuni er so einki um tosið um at hann komandi ár skal spæla við FCK*

# Nóg mikið at tríva í

**Hóast týdningurin av einum framhaldandi landsliðsarbeiði frá fleiri síðum verður førdur fram, so hevur hondbóltssambandi enn ongar ítøkiliga ætlanir á borðinum um, hvussu leisturin verður framyvir**

LANDSDYSTIR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*



*HSF formaðurin roknar við, at eitt uppskot til loysn upp á venjaraspurningin er komin upp á pláss undan aðalfundinum hjá HSF*

At júst farnu landsdystirnir – teir fyrstu í altjóða høpi í drúgt áramál – hava verið eitt ódnartak hjá Hondbóltssambandinum, er einki at ivast í. Tungt ella ikki, so tykist tó breið semja at vera um, at landsliðsleikarar okkara eiga at fáa so nógvar og títtar avbjóðingar avbjóðingar sum gjørligt.

Tá vit eftir seinastu dystirnar fingu orðið á formannin í HSF, Petur Ova Petersen, ásannaði hann eisini týdningin av hesum, men hann legði tó afturat, at enn er so einki avgjørt í so máta.

– Tað einasta, sum liggur heilt fast, er at arbeiðið skal halda fram. Næsta stóra tiltakið verður so HM undankappingin, sum verður um á leið eitt ár, men sjálvandi vóna vit, at nakað so eisini hendir frá nú av og fram til ta tíð.

– Tað er tó fyrst og fremst ein fíggjarligur spurningur, men tað er mín vón, at vit fáa møguleikan at luttaka í onkrum kappingum. Kanska ber eisini til at fáa onkran venjingardyst móti øðrum landsliði ella einum sterkum felagsliðið.

Í summar er sonevnda Challenge-kappingin, sum er ein kapping fyri smærri hondbóltstjóðir, sum annað hvørt ár verður hildin fyri ávíkavist mans- og kvinnulandslið. Í fjør meldaðu vit kvinnuliðið til hesa kapping, men tíverri sluppu vit ikki upp í part. Tað er soleiðis, at bert seks lið eru við í kappingini, so tað er heldur ikki víst, at vit kunnu sleppa við í ár, men tað hevði so verið ein møguleiki. Eisini eru kappingar í Danmark ímeðan okkara kapping liggur still, so eisini har er møguleiki at fáa dystir, sigur Petur Ove.

## Venjaraspurningurin

Áðrenn farast kann undir nakra kapping, er tó sjálvsagt neyðugt við eini loysn á venjaraspurninginum, og eins og við so nógvum øðrum, so er talan eisini her um spurning, sum fyri ein part er fíggjarligur.

– Vit hava havt samband við onkrar norðurlendskar venjarar, men tað vísur seg, at talan í flestum førum er um upphæddir, sum eru ov stórar hjá okkum at bera, sigur Petur Ove. Hann leggur tó afturat, at enn hava teir sum so ikki rættiliga kannað marknaðin, og áðrenn hetta er gjørt, er sum so einki at taka støðu til.

– Fyrst og fremst mugu vit sjálvsagt kanna, hvørjir møguleikar eru tøkir hjá okkum, og síðani mugu vit eisini royna at fáa leikararnar við í avgerðina um, hvussu hesin spurningur skal loysast.

Júst nær hetta arbeiði kann vera liðugt, dugir formaðurin í HSF ikki at siga, men hann leggur tó afturat, helst ikki skal ganga ov long tíð, til málið er loyst. Hann vísir á, at fyrireikingararbeiðið til hetta helst skal vera liðugt undan aðalfundinum hjá HSF, sum verður stutt eftir kappingarlok.

At enda spurdu vit Petur Ova, um tað eru serligir førleikar, sum HSF ætlar at leggja seg eftir, nú nýggjur venjari skal finnast, men út yvir tað málsliga, er ikki nakað serstakt, sum fellur formanninum til hugs.

– Nei tað veit eg ikki. Ikki annað enn tað, at spælararnir helst skulu skilja hvat venjarin hevur at siga, og eg rokni við, at teir helst vilja hava ein venjara, sum í minsta lagi tosar norðurlendskt, sigur Petur Ove Petersen at enda.



# Havnarmenn hótta klaksvíkingar

**Við stórsigri á sandavágsmonnum hava havnarmenn veruliga blandað seg í toppin. Teir liggja nummar tvey aftanfyri klaksvíkingar sum fingu 2-2 ímóti teimum altjóðu kollfirðingunum.**



*Í GM kappingini í Hollandi telvaðu Kasparov og Topalov eitt sera snøgt og spennandi talv, sum eisini sæst á hesum síðum. Shirov er á odda í sterku kappingini*

TALV:
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Toppdysturin hetta vikuskifti varð í Kollafirði har klaksvíkingar vitjaðu. Við IM Leif Kristensen á fyrsta borði hjá kollfirðingum og ongum Rana Nolsøe á útiliðnum vóru útlitini ikki av teimum bestu hjá klaksvíkingum.

IM Leif Kristensen, sum búði og telvaði nøkur ár í Føroyum í 80´unum, var sjálvsagt favorittur við sínum 2365 ratingstigum ímóti Steintór Rasmussen, men veruleikin varð tann at Steintór tíðliga fekk fyrimun og eisini finnu meir. Leif fekk tó avviklað støðuna til eitt heldur óklárt endatalv, har tað vísti seg at Steintór møguliga átti at hildið fram tá tikið var javnt. Higartil hava útlensku talvmeistarnir ikki havt tað lætt í Føroyum, og tað er gott tekin fyri føroyskari telving.

Klaksvíkingar høvdu styrkt annað borð við Willie Olsen sum hitti Hans Kristian Simonsen á øðrum borði. Hans Kristian fór í øgiligt álop við svarta fólkinum og tá Willie framanundan stóð kroystur varð lítil ivi um úrslitið.

Enn einaferð vann Tummas M. Anthoniussen, hesaferð á Bernhard Thomsen. Tummas vann sær nøkur tempo tá Bernhard óneyðugt reikaði runt við frúnni, og sektaði hesum við krútsterkum álopi sum vann.

Á fjórða borði skiftust Ingolf Gaard og heimkomni Heri V. Thomsen um fyrimun og endin varð at Ingolf bleiv tann seinasti at útjavna og samdust teir hareftir um javnleik.

Bæði liðini eru helst nøgd við úrslitið 2-2 Allarhelst ætlaðu kollfirðingar meir, men klaksvíksliðið hevur longu prógvað seg sum eitt verdugt boð til FM heitið, og tískil kunnu kollfirðingar ikki vera heilt ónøgdir.

## Gongur rætta vegin

Sanniliga kann sigast at vend er komin í liðkappingina eftir 6. umfar. Fyri tveimum umførum síðani lógu teir úr Havnini á niðasta plássi, men eftir at Flóvin Tór Næs hevur verið heima og styrkt um liðið er rættilig gongd komin í.

Torkil Nielsn er burturstaddur, og tískil fekk Bernhard Augustinussen ábyrgdina á fyrsta borði ímóti Flóvin. Í Byrjanini hendi einki taluvert, men í miðspælinum fekk Flóvin avviklað støðuni til eitt betri endatalv við finnu meir, sum hann eisini vann.

Gutti Petersen heldur fram við sínum góðum úrslitum. Hann hitti Haldur S. Johansen á øðrum borði, og fekk ognað sær finnu í yndisbyrjanini sínari, lukkaði sisilianarin. Haldur fekk býtt fólkið av, og í rókaendatalvinum samdust teir um javnleik.

Eftir eina ringa kappingarbyrjan hevur Herluf Hansen fótað sær. Hann vann sunnudagin heldur lættliga á Hera Christoffersen. Herluf fekk tvær sentrumsfinnur sum gingu beina leið ímóti málinum, og Heri gavst í vónleysari støðu.

Á fjórða borði forðaði Olaf Berg Sonna Nielsen at fara í borg, og fekk eisini snildisliga kvalitet til hølvdar og tá kundi Sonni gevast.

3,5-0,5 til Havnina. Styrkurin frá flatlondum verður allarhelst ikki við komandi umfar sum verður leikt 4. február, og sandavágsmenn mugu nærum gera tað ómøguliga um teir skulu gera sær vónir um framhaldandi umboð í fremstu røð næsta kappingarár.

## Vestmenningar vaknaðir

Nú bragdaði endiliga hjá vestmenningum. Við 3-1 sigrinum á toppliðnum úr Hvalvík hava eisini teir nomið við toppin, og hesaferð varð tað fyri fyrstu ferð triðja- og fjórða borð at takka.

John Rødgaard hevur ikki veruliga havt eydnuna við sær í ár, og ímóti Martin Brekká eydnaðist tað honum ei heldur at vinna. Javnleikur varð úrslitið. Eisini talvið millum Torbjørn Thomsen og Finnbjørn Zachariassen bleiv javnt.

Hinvegin vunnu John Jacobsen og Kári Durhuus á ávikavist Sámal Christiansen og Gunnar Joensen. Hetta er júst hvat vestmenningar hava manglað, nevnliga at lægru borðini fáa stig, og heldur hesin stimi fram koma teir helt langt.

Bert trý stig eru frá klaksvíkingum niður til næstaftasta lið, Vestmanna.

## 2. deild

Spenningurin í 2. deild økist nú runavíkingar við Ólavi Simonsen á odda eru byrjaðir endaspurtin. Teir vunnu stórt á Gøtu, 3-1, og meðan Havnin 2 vann tepurt á Havnini 3, er munurin minkaður í toppinum.

Dysturin millum Klaksvík og Toftir er útsettur.

Í triðju deild stendur stríðið millum Vestmanna, Havnina og Kollafjørð, meðan hini liðini bert hava æruna at spælu fyri.

## Eyðun deilt fyrsta pláss

Fýra føroyingar hava júst luttikið í einari vikuskiftiskapping í Farum. Hesir vóru Eyðun Nolsøe, Carl Eli Nolsøe Samuelsen, Regin Reinert, sum allir luttóku í fremsta bólki, og Dannie Nielsen sum var í triðja bólki.

Eyðun varð seedaður næsthægstur og Carl Eli fjórðhægstur. Tað gekst væl í hond, tí tá avtornað var fekk Eyðun deilt fyrsta pláss við sínum fýra stigum av fimm møguligum, meðan Carl Eli fekk hálvtfjórða stig og endaði nummar trý. Regin fekk tvey stig, meðan Dannie fekk trý stig í sínum bólki.

## Wijk ann Zee

Shirov eigur enn oddasessin í GM kappingini í Hollandi. Undan áttinda umfari sum bleiv telvað í gjár lá hann hálvt stig omanfyri Kasparov og Kramnik, sum hava fimm stig. Síðani koma nøvn sum Morozevich, Adams og Anand. Trettan umfør skulu telvast.

Talvið í sjeynda umfarið millum Kasparov og Topalov er talvið hesa vikuna. Eitt sera vilt og snøgt talv.

**1. Deild**

| | | |
|---|---|---|
| **KT** | **KTF** | **2-2** |
| IM Leif Kristensen(2365) | Steintór Rasmussen (2055) | 0.5-0.5 |
| Hans Kristian Simonsen (1785) | Willie Olsen (2005) | 1-0 |
| Bernhard Thomsen (2015) | Tummas M. Anthoniussen (1900) | 0-1 |
| Heri V. Thomsen (1900) | Ingolf Gaard (1770) | 0.5-0.5 |
| **VT** | **TFS** | **3-1** |
| IM John Rødgaard (2310) | Martin Brekká (2070) | 0.5-0.5 |
| Torbjørn Thomsen (2220) | Finnbjørn Zachariasen (2045) | 0.5-0.5 |
| John Jacobsen (1915) | Sámal Christiansen (1845) | 1-0 |
| Kári Durhuus (1770) | Gunnar Joensen (1845) | 1-0 |
| **ST** | **HT** | **0.5-3.5** |
| Bernhard Augustinussen(1850) | Flóvin Þ. Næs(2235) | 0 - 1 |
| Gutti Petersen(1575) | Haldur S. Johansen(2030) | 0.5-0.5 |
| Heri Christoffersen(1630) | Herluf Hansen(2020) | 0 - 1 |
| Sonni Nielsen(1745) | Olaf Berg(1895) | 0 - 1 |

**2. Deild**

| | | |
|---|---|---|
| **TT** | **KTF 2** | **Útsettur** |
| **RT** | **GT** | **3-1** |
| Ólavur Simonsen(2175) | Jónfinn Thomsen(1850) | 1-0 |
| Brandur K. Jacobsen(1710) | John Joensen(1725) | 0.5-0.5 |
| Rúni Jacobsen (1700) | Reinhold Isaksen (1725) | 1-0 |
| Eyðun Lamhauge(1600) | Jákup F. Joensen (1690) | 0.5-0.5 |
| **HT 2** | **HT 3** | **2.5-1.5** |
| Jóhan Gaard(1820) | Johan E. Hansen(1595) | 0-1 |
| Michael Jensen(1800) | Jón Andreasen(1635) | 1-0 |
| Poul Poulsen(1770) | Andrias Jacobsen(1295) | 0.5-0.5 |
| Jógvan Næs(1680) | Remi Petersen | 1-0 |

**1.deild**
**Støðan eftir 6. Umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | KTF, Klaksvik | 14.5 |
| 2. | TFS, Hvalvík | 12.5 |
| 3. | HT, Tórshavn | 13 |
| 4. | KT, Kollafjørður | 12.5 |
| 5. | VT, Vestmanna | 11.5 |
| 6. | ST, Sandavágur | 8 |

2. deld
**Støðan eftir 6. Umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | HT 2, Tórhavn | 15.5 |
| 2. | RT, Runavík | 13 |
| 3. | GT, Gøta | 12.5 |
| 4. | KTF 2,Klaksvik | 11 |
| 5. | TT, Toftir | 11 |
| 6. | HT 3, Tórshavn | 5 |

**3.deild**
**Støðan eftir 6. Umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | KT 2, Kollafjørður | 17.5 |
| 2. | VT 2, Vestmanna | 17.5 |
| 3. | HT 4, Tórshavn | 17 |
| 4. | KTF 3, Klaksvík | 8.5 |
| 5. | Rókur, Oyri | 6.5 |
| 6. | VT 3, Vestmanna | 5 |

## Talvið hesa vikuna

Kasparov,G (2849) - Topalov,V (2718)
Corus Wijk aan Zee NED (7), 21.01.2001
1.e4 c5 2.Nf3 d6 3.d4 cxd4 4.Nxd4 Nf6 5.Nc3 a6 6.Be3 e6 7.f3 b5 8.g4 h6 9.Qd2 Nbd7 10.0-0-0 Bb7 11.h4 b4 12.Na4 Qa5 13.b3 Nc5 14.a3 Nxa4 15.axb4 Qc7 16.bxa4 d5 17.e5 Nd7 18.f4 Nb6 19.Rh3 Nc4 20.Qc3 Rc8 21.Bd2 Be7 22.Be1 Rb8 23.f5 Bc8 24.Bxc4 dxc4 25.Qf3 Bd7 26.fxe6 fxe6 27.g5 hxg5 28.hxg5

(leggið til merkis at Topalov hevur møguleika at taka fýra finnur hjá Kasparov, men støðan er somikið hættislig at Topalov ikki hevur tíð at taka nakra finnu) Rxh3 29.Qxh3 Qxe5 30.Qh5+ Kf8 31.Nf3 Qe3+ 32.Kb2 Be8 33.Qh8+ Kf7 34.Bc3 1-0

